

*Oasan fer nú undir aftur regluliga bíbliuundirvísing*

# Viðkomandi undirvísing úr Bíbliuni

**Nú vetrarhálvárið byrjar verður skipað fyri bíbliuundirvísing í Oasuni í Hoyvík. Tað verður annaðhvørt mikukvøld, og er hetta fyri øll.**
**– Tað krevst eingin serligur forkunnleiki fyri at vera við, verður sagt úr Oasuni.**

SAMKOMUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**HOYVÍK:** Fyrsta bíbliuundirvísingin verður mikukvøldið 13. september kl. 20 stundisliga. Tað verða ymisk fólk frá samkomuni sjálvari, sum koma at undirvísa.

Tað eru sera viðkomandi evni, ið undirvíst verður í. Millum hesi kann nevnast: "Guðs Orð, Orðið hin fasti grundvøllur", har m. a. verður sagt frá, hvat Harrin sjálvur sigur um grundvøllin í kristna lívinum, og hvussu vit menniskju kunnu byggja á henda grundvøllin, klettin Jesus Kristus.

Undirvíst verður somuleiðis í fylgjandi evni: "Myndugleikin í Guðs Orði", sum snýr seg um hetta Orðið, ið hevur ein so ómetaligan myndugleika, tí tað er ikki mannaverk, men tað er innblást av Guði og er tí óvikandi.

Eitt annað evni er: "Tað sum Guðs Orð virkar", her greitt verður frá um, hvussu tað grøðir, upplýsir og gevur skynsemi, Orðið reinsar og halgar, og tað er okkara andaliga spegil og dómari, fyri bert at nevna ein lítlan part.

Somuleiðis fara bíbliutímarnir at taka evni úr fjallaprædiku Jesusar.

Kvøldið verður skipað soleiðis, at byrjað verður við sosialum felagsskapi, har vit fáa ein drekkamunn og vit práta saman.

Eftir hetta byrjar sjálv undirvísingin, sum varar í umleið 40 minuttir. Allir luttakarar fáa útflýggjað eitt A4 ark við m. a. høvuðspunktum í evninum og øðrum viðkomandi upplýsingum og spurningum. Undirvísingin verður eisini illustrerað við Power Point, so skriftstøð og annað viðkomandi verður víst á vegginum.

Eftir sjálva undirvísingina verður høvi hjá luttakarunum at umrøða evnið, annaðhvørt í bólkum ella á annan hátt.



*- Vit halda ikki, at tað er nøkur orsøk til, at vit skulu vera eftirbátar á hesum økinum, sigur Annita á Fríðriksmørk, løgtingskvinna hjá Tjóðveldisflokkinum.*

# Lógin skal herðast

**Lógargreinin ið fastsetir revsingina í neyðtøkumálum skal broytast. Tað er ein gomul lóg, ið er galdandi í Føroyum, sum ger, at neyðtøkur verða revsaðar nógv linari í Føroyum enn í Danmark**

NEYÐTØKUR
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Eftir at Sosialurin seinastu dagarnar hevur varpað ljós á, at revsingin fyri neyðtøkur er nógv linari í Føroyum enn í Danmark, hava Annita á Fríðriksmørk og Finnur Helmsdal úr Tjóðveldisflokkinum tikið málið upp.

Tey arbeiða við einum ríkislógartilmæli, ið skal at herða revsirammuna fyri neyðtøku. Tilmælið verður lagt fyri Løgtingið 19. september.

Henda sama lógargrein var herd í Danmark fyri fýra árum síðani. Broytingin ger, at ein neyðtøkumaður í Danmark, sum útgangsstøði skal inn at sita eitt heilt ár longri enn ein neyðtøkumaður í Føroyum.

Tá ein lóg verður broytt í Danmark, er tað føroysku politikararnir, ið avgera, um lógin eisini skal broytast í Føroyum.

– Tað er ikki nakað politiskt motiv, ið liggur aftanfyri, at revsingin í neyðtøkumálum ikki er herd í Føroyum, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum.

– Tá ein lóg broytist í Danmark, er tað ikki sjálvvirkandi, at lógin eisini broytist í Føroyum. Revsilógin er danskt mál, har nakrir partar av henni eru dagførdir. Men vit eru langt afturút við at dagføra ríkislógir í Føroyum, sigur Jacob Vestergaard.



*– Vit eru langt afturút við at dagføra ríkislógir í Føroyum, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum.*

– Vit halda ikki, at tað er nøkur orsøk til, at vit skulu vera eftirbátar á hesum økinum, sigur Annita á Fríðriksmørk.

– Tí leggja vit nú tilmælið fram.

Um tilmælið verður samtykt í Løgtinginum, verður tað sent til danska løgmálaráðið, ið er umsitingarligi myndugleikin, ið skal avgreiða broytingina lógina. Tá uppskotið er samtykt í Løgtinginum, er tað ein avgreiðsluspurningur at fáa broytingina ígjøgnum.

– Vit vænta at fáa lógarbroytingina ígjøgnum, sigur Annita á Fríðriksmørk.

Um alt gongur eftir ætlan, kann broytingin koma í gildi í ár ella fyrst í komandi ári.